# GERÐABÓK

**Dato:** **2. mai 2012** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 86/12-127/12**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Rúni DjurhuusHalla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Maria H. Olsen, sum hevur farloyvi

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Jákup E. Hansen
Bjørgfríð Ludvig
Heri Olsen

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**100/12** **2012-0178**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið til eftirtektar.

**101/12** **2012-0664**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2012**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 29. mars 2012:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2012 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 2. mai 2012:** Framlagt og góðkent.

**102/12** **2012-0989**

**Ársroknskapurin fyri 2011 hjá Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt góðkendur.

**103/12** **2012-0983**

**Ársroknskapurin 2011 hjá Tórshavnar havn**

**Havnarnevndin 23. apríl 2012:** Góðkent og samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt góðkendur.

**104/12** **2012-0984**

**Grannskoðanarfrágreiðing 2011 hjá Tórshavnar havn**

**Havnarnevndin 23. apríl 2012:** Framlagt. Samtykt at leggja grannskoðanarfrágreiðingina fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 2. mai 2012:** Framlagt.

**105/12** **2012-0991**

**Framfluttar játtanir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2011 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2012.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2011.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting av t.kr. 32.919 netto, til rakstur og t.kr. 119.019, netto, til íløgur.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**106/12** **2012-0990**

**Val av grannskoðara**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
§ 46 í kommunustýrislógini. Í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. *Stk. 2.* Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at grannskoðarin heldur fram.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**107/12** **<u>2011-2314/6</u>**

**<u>SMS. Søkir um at keypa umleið 445 fermetrar burturav matr. nr. 137b. Hoyvík. (Við Karlamagnussarbreyt)</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
SMS eigur frammandundan hesar ognir á Karlamagnussarbreyt.

Matr. nr. 138 z. Stødd 1537 m² + 14 % av matr. nr. 138ac.
Matr. nr. 138 x. Stødd 406 m² + 4 % av matr. nr. 138ac

SMS hevur ætlanir um at byggja ein Bónus – handil á matr. nr. 138z. Ætlanin umfatar eisini eitt stórt parkeringsøki á matr. nr. 138x, 138ac og á umsóktu 445 fermetrunum.

| M² | Ognarviðurskifti | |
|---|---|---|
| Matr. nr. 138ac. | 591 | (Felagsogn hjá 23 grundøkjum) |
| Matr. nr. 138x | 406 | (Ogn hjá SMS, eigur eisini 4% av ac) |
| Matr. nr. 138ac | 579 | (Felagsogn hjá 23 grundøkjum) |
| Umsókt øki | 445 | (Ogn hjá SMS. Ikki partur av Karlamagnussarbreyt) |
| Parkeringsøki í alt | 2.021 | |

Talan verður um umleið 60 parkeringsbásar á nevnda øki.

SMS vísir eisini á, at neyðugt er at fáa økið til egna innkoyring til goymsluhølið.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka-/løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin viðmælir søluni, vísandi til at byggiætlanin hjá umsøkjaranum er gjørd av umsøkjaranum og kommununi í felag.

Halla Samuelsen og Bogi Andreasen vóru ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at nevndin viðmælir søluni, vísandi til at byggiætlanin hjá umsøkjaranum er gjørd av umsøkjaranum og kommununi í felag.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Býararkitekturin greiddi frá málinum. Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og søkja Innlendismálaráðið um frávik frá ásetingunum í kunngerð um útboð at kommunalari fastogn vísandi til, at talan er um serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**108/12** **2011-1279 LA**

**HildurKrossteig Poulsen søkir um frávik í byggisamtyktini um byggiloyvi til hálvtekju afturat sethúsinum uttanfyri "byggifelti" til slíka bygging sambært skeyti.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Tann 17. mai 2011 kemur ein umsókn frá Hildur Krossteig Poulsen um byggiloyvi til eitt hálvtak yvir ein komandi súklu- og goymsluskúr og eitt snórastativ.
Av tí, at ætlaða byggingin er uttanfyri "byggifelti" til slíka bygging sambært skeyti á 300m² grundstykkjum á Hoyvíkshædd, fær umsøkjarin noktandi svar frá byggivaldinum tann 27. mai 2011.

Og 16. juni 2011 fær byggideildin so eina umsókn um undantaksloyvi til júst somu bygging, sum noktað varð fyri.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum A3.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið matr. nr. 135hz, Hoyvík, er 325m² til víddar.
Ábygt er eini sethús á ognuni.

**Frávik:**
Bygt verður ikki í "byggifeltinum"sambært skeytinum "Byggiøki til bilskúr" (sí viðlagda avrit)

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar bindingar fyri kommununa.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar j. nr. 2011-1279/1
Noktað byggiloyvi j. nr. 2011-1279/2
Fráviksumsókn j. nr. 2011-1279/3
Metingarskjal j. nr. 2011-1279/4
2 stk. glærir
Skjal viðvíkjandi "byggifeltum"
Loftmynd av økinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá, at veita frávik til bygging uttanfyri økið, ið er avsett til slíka bygging sambært skeytinum viðvíkjandi "byggifeltum".

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti at senda málið til grannahoyring.

**Ískoyti:**
Málið er sent til grannahoyring hjá 4 grannum og er freistin at svara sett til hósdagin 15. september 2011.

Møgulig mótmæli frá grannunum verða lisin upp á fundinum.

**Jógvan var ikki við til hetta málið.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. september 2011:** Nevndin samtykti at ganga umsóknini á møti, og at beina málið í fíggjarnevndina til støðutakan um frávik frá skeytistreytunum um byggifelt til bilhús.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Beint aftur til byggi- og býarskipanarnevndina at greina tilmæli sítt nærri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen samtyktu ikki at ganga umsóknini á møti vísandi til at frávikini eru ov stór vísandi til skeytistreytirnar.

Ein minniluti Bogi Andreassen og Sjúrður Olsen taka undir við tilmælinum í byggi- og býarskipanarnevndini 19. september 2011.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kommunan fær enn einaferð eina umsókn frá Hildur Krossteig Poulsen, dagfest 29. feb. 2012, um tað sama. Hesuferð við myndum og grundgevingum um hvussu neyðugt tað er, at fáa frávik at gera bilskýlið v.m uttanfyri byggifeltið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á, at onki nýtt er í málinum, og vísa til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini frá 17. okt. 2011.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen samtyktu ikki at ganga umsóknini á møti vísandi til at frávikini eru ov stór vísandi til skeytistreytirnar.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Vagnur Johannesen mæla til at ganga umsóknini á møti og vísa til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 19. september 2011 og krevja málið fyri býráðið.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar-nevndina og fíggjarnevndina.

**109/12** **2012-0822/4 SG**

**Gøtunavn til útstykking við Djúpagil**

Býarskipanardeildin heitir á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til eitt navn - møguliga tvey nøvn – til nýggju útstykkingina norðan fyri randarhúsini millum Gilja í Hoyvík. Útstykkingin hevur heitið ”Útstykking við Djúpagil” (mál. nr. 2007-1290). Talan er um eina útstykking við umleið 30 grundøkjum, og innkoyring til økið verður frá sambindingarvegnum Klingruni.

**Gøtunavnanevndin 2. apríl 2012:** Gøtunavnanevndin mælir til, at nýtt verður eitt gøtunavn til allan býlingin, og at navnið verður “oman Gil”, tí útstykkingin er oman fyri Djúpagil.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**110/12** **2012-0681**

**Útstykking Kaldbak - Sølustøða.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykkingin í Kaldbak umfatar í alt 10 sethúsagrundstykkir. Fermeturprísurin er kr. 793,51.

Grundøkini eru matrikuleraði fyri góðum 2,5 árum síðani, men eru enn bert 4. stykkir seld.

Ein av eigarunum ynskir at lata stykkið innaftur, og er í løtuni bert ein møguligur áhugaður keypari til eitt av stykkjunum.

Í sølutilgongdini hevur tað eisini víst seg, at áhugi var at keypa tey 4 uttastu stykkini ( tey sum liggja móti bygdini ) tí her var minni jarðarmunur.

Útstykkingin er annars sera trupul, tí talan er um sera stóran jarðarmun, og er tí talan um dýra og tekniskt trupla byggibúning, samstundis sum fermeturprísurin er høgur.

Jarðarmunurin verður størri longur inni, og er byggibúningarkostnaðurin tískil hægri, longur inni móti kaldbaksfirði.

Ein møgulig loysn kundi tí veri at kommunan átók sær at gera grundøkini byggibúgvin.

Trupulleikin er tó at stykkini tá vildu gjørst enn dýrari.

Ein kanning av møguligum byggibúningarkostaði eigur at vera umhugsað.

Annar møguleiki er at lýsa stykkini til sølu, til marknaðarprís. Í hesum føri verður marknaðarprísurin mettur at vera lægri enn kostprísur.
Kommunan kann í eini sølutilgongd áseta ein mettan minstaprís.

**Dømi:**
Um kommunan selir stykkini fyri kr. 550 fermeturin ( sum kann vera minstiprísur )

| | |
|---|---|
| Talan er um í alt. 5.164 fermetrar á kr. 793,51 = | kr. 4.097.685,64 |
| Harav eru seldir 1.590 fermetrar á kr. 793,51 = | kr. 1.633.043,58 |
| = útlegg | kr. 2.464.642,06 |

Um øll stykkini verða seld fyri kr. 550,00 fermeturin, fær útstykkingin eitt hall á kr. 1.257.486,64 ( Herav endurgjald til teir 4. verandi eigararnar í alt kr. 501.143,58 )

Um teir 4. eigararnir verða hildnir uttan fyri verður hallið kr. 756.343,06

Um stykkini vera seld í fríðari sølu, verður mett at stykkini fáa ymiskan prís, samstundis sum onkur stykki framvegis ikki verða seld.

Umsitingin er í iva um hvat gerast skal. Vanligt er at selja stykkini í eini skipaðari útstykking til kostprís, og til teir møguligu keyparar sum standa á bíðilista til sethúsagrundøki.

Í hesum føri hevur tað ikki eydnast at selja stykkini eftir bíðilista, og heldur ikki nú stykkini hava ligið í fríðari sølu til fastan prís.

Tað er okkara metan at stykkini eru ov dýr, samstundis sum tey eru trupul og dýr at gera byggibúgvin

Trupult er at áseta marknaðarprísin sum væntandi eisini í hesum føri kann gerast lægri enn uppstillaðu kr. 550 pr. fermeturin.

Um kommunan velur at selja stykkini til marknaðarprís, er spurningurin eisini um kommunan er moralskt bundin fyri teimum keyparum sum frammanundan longu hava ognað sær eitt stykki til kostprís.

Løgdeildin metir ikki at kommunan er juridiskt bundin at gomlu keyparunum, tí talan er um endaligan handil, har keyparin til tá kendar fortreytir keypir eitt grundøki til ásettan prís.

**Tilmæli.**
Leiðarin í starvsfólka og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at fíggjarnevndin umrøður málið.

Skal kommunan

1. Lýsa stykkini til sølu í fríðari sølu til marknaðarprís.
2. Kanna møguligan byggibúningarkostnað.
3. Gera byggibúning lidnað og selja til kostprís.
4. Gera byggibúning lidnað og selja til marknaðarprís
5. Um stykkini verða seld til marknaðarprís. Vil kommunan tá endurrinda verandi eigarum ein møguligan mun millum kostprís og marknaðarprís. Og hóast mett verður at kommunan ikki er juridiskt bundin at einum endurgjaldi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Leiðarin í starvsfólka- og løgdeildini og miðfyristingarstjórin mæla til at lýsa tey óseldu stykkini í fríðari sølu til marknaðarprís.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til, at grundøkini hava verið boðin til sølu á bíðilistanum hjá kommununi, men at áhugi ikki er til staðar at ogna sær grundøkið, verður mælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum og lýsa grundøkini til sølu í fríari sølu, og verða tey seld, um hóskandi boð fæst.

**Býráðið 2. mai 2012:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**111/12** **<u>2006-2655</u>**

**<u>Afturkeyp av óbygdum sethúsagrundøki matr. nr. 135ka, Dýrindalsgøta 19, Hoyvík</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Grundøkið er 517 m² útgrivið sprongt og planerað. Íbindingarbrunnar gjørdir til sundurskildar leiðingar, regnvatn og skitivatn. Grundøkið er klárt at byggja á.

Talan er um óbygt grundøkið. Eigarin er sinnaður at lata stykkið innaftur til kommununa fyri kostprís kr. 504.681,12

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa grundøkið aftur fyri kr. 504.681,12 svarandi til ein fermeturprís á kr. 976,17.

Vísandi til at talan er um eina eldri útstykking, verður mælt til at stykkið verður selt aftur í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til, at talan er um eina av teimum nýggjastu útstykkingunum í kommununi, verður mælt býráðnum til at keypa grundøkið aftur fyri kr. 504.681,12 svarandi til ein fermeturprís á kr. 976,17 og at selja grundøkið aftur eftir bíðilistanum fyri kr. 504.681,12.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt

**112/12** **2007-1290 MKJ/PAP/GHM**

**Útstykking – Djúpagil – Millum Gilja**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykking í økinum, har Djúpagil møtir nýggja sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin.

Útstykkingin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi við áum og gilum, sum seinni blíva størri við Djúpagil. Ætlanin er, at avkoyring til skal verða frá nýggja sambindingarvegnum til útstykkingina.

Útstykkingin vil halda fram við verandi útstykkingar fram við gilinum, niðan til nýggja sambindingarvegin og harvið eisini binda økini á báðum síðum av sambindingarvegnum meira saman.

Økið kann íalt hýsa 30 nýggj grundøki við møguliga einum øki til stovnsbygging eystanfyri. Hetta síðsta vil tó helst krevja eina íbinding afturat í sambindingarvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 500.000,- kr. verða settar av til projektering og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Hon heitti samstundis á umsitingina at fyrireika útstykkingina soleiðis, at stykkini verða seld liðugt planeraðið. Kunnað var um at talan er um eina útstykking við 300 fermetra stykkjum við felags parkeringsplássum, gøtusambondum og skipaðum fríøkjum. Nettonýtslustigið verður 0,4.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at leggja kr. 500.000,- út til projektering og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útstykkingarætlan við uml. 35 grundstykkjum á 300 fermetrar og 2 felagsøkjum. Útstykkingin hevur atgongd frá sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin og er skipað í 4 bólkar fram við einum atkomuvegi. Atkomuvegurin hevur gongubreyt báðumegin.

Norðan fyri atkomuvegin er avsett pláss til 1 eyka parkeringspláss pr. matrikul. Innkoyringarnar til bústaðarbólkarnar eru markeraðar við vegbungum. Gøtusamband er til Stórutjørn gjøgnum ein tunnil undir sambindingarvegnum.

Grundstykkini liggja fram við 8 m breiðum vegum uttan kantsteinar. Vatnrennur úr beton er mark millum gongubreyt og koyribreyt. Koyribreytin er 4 m breið.

Ætlanin er at lata liðugt planerað grundstykkir við ásettum byggifelti og planeringshædd.

Gongugøtur eru millum bústaðareindirnar og felagsøkir. Gøturnar hava samband við verandi gøtuskipan.

Ætlanin er at bjóða útstykkingina út millum 5 ráðgevarar til projektering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna ætlanina og at projekteringin av útstykkingini verður boðið út millum 5 ráðgevaravirkir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við støðutakanina til víðari projektering av ústykkingarætlanini, skal støða takast til atkomuviðurskifti til rørslutarnað, gongu- og súkklubreyt og reinskan av vegvatni. Vìst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-1436: Mál um súkklubreytir og atkomurviðurskiftini hjá rørslutarnaðum og mál nr. 2005-1437: Mál um yvirflatuvatntrupulleikar í kommununi.

Greitt verður frá útstykkingarætlanini.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, men ynskir at umsitingin kemur við einum betri uppskoti um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Plan-og rakstrardeildin hevur viðgjørt spurningin um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst. Víst verður til TK j. nr. 2011-2473/skjalamappur 1-4.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til útstykkingarætlan - uppskot nr. 4 (j. nr. 2011-2473/4), tó við teirri broyting, at íbindingin verður yvir av framtíðar íbinding til Stórutjørn og at vegamótið verður skipað soleiðis, at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Ferðslunevndin 1. november 2011:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum og beinir málið í teknisku nevnd til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðaran á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við ferðslunevndini og at beina endaligu loysnina og tær broytingar, tær viðføra av útstykkingarætlanini, til byggi- og býarskipanarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Jan Christiansen og Annfinn Brekkstein, ynskir at umsitingin kemur við alternativum uppskotum við kostnaðarmetingum, at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Levi Mørk, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegna krøv frá teknisku deild um broyting av atkomuviðurskiftunum í mun til upprunauppskotið (2007-1290/6), hevur umsitingin tillagað upprunauppskotið (sí skjal2007-1290/20,3). Afturat eru gjørd 2 alternativuppskot (sí skjøl 2007-1290/20,1 og 2).

Hjálagt eru yvirlit yvir veglongdir, tal av grundstykkjum og samlað grundøki.

**Tilmæli:**
Tekniska stjórin og býararkitektin mæla til:
1. At góðkenna uppskotið til útstykkingaætlan.
2. At góðkenna vegføring og íbinding treytað av góðkenning í tekniska nevnd.
3. At umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt við m.a. áseting av byggifeltum, byggilinjur o.a. at leggja fyrri nevnd.
4. At heimilda umsitingin at útvega skitsuupskot við kostnaðmeting fyri liðugt planeraði stykkir.
5. At jatta upp til 400.000kr.til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera alternativ uppskot við fyribils kostnaðarmetingum sambært samtykt í teknisku nevnd frá 8. november 2011.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við alternativa uppskoti nr. 1, dagf. 14.11.11, j.nr. 2007-1290/20 (1 av 3). Samstundis verður mælt til at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta 400.000 kr. av konto 6175 til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av projektuppskoti út millum 4 ráðgevarafyritøkur. Sí útbjóðingarskjal TK j.nr.2012-0564/10. 3 tilboð er komin inn. Sí hjálagt skjal lisitatiónsprotokol TK j.nr 2012-0739.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við lægsta tilboðnum frá Landsbyggifelagnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Landsbyggifelagnum, sum hevði lægsta boðið áljóðandi kr. 96.875,- uttan mvg.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**113/12** **<u>2010-2002</u>**

**<u>Kongabrúgvin</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært skitsuuppskotum fyri miðbýin, hevur býarskipanardeildin m.a. arbeitt við at gera økið framvið bryggju til ein meira aktivan part av miðbýnum.

Verandi skitsuuppskot á Kongabrúnni er ein liður í hesari ætlan, sum hevur til endamáls at umskipa plássið við munnan av Havnará til eitt uppihaldsøki.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til uppihaldsøki, sí viðheftu tekningar og j.nr. 2010-2002/3.

Ì uppruna skitsuuppskoti fyri miðbýin var ætlanin at fremja alt plássið framvið Kongabrúnni niðan til Essaba, sí j.nr. 2010-2002/2. Ávísar broytingar eru gjørdar í sambandi við uppruna uppskot.

Verandi uppskot til Kongabrúnna er fyrsti liður til eina víðari ætlan, sum hevur í fyrstu atløgu atlit til parkering og alt plássi, sum eftir ætlan skal gerast seinni.

Trý føst bátapláss verða tikin burtur, um verandi uppskot verður framt. Umframt tey trý føstu bátaplássini eru pláss til smærri bátar, sum gummibátar, sum mugu takast burtur. Tórshavnar Havn meina, at hetta ikki er í lagi at taka bátaplássini burtur, vegna plásstrot av bátum í Havn; men vísa á, at tað er møguligt at leggja bummar frammanfyri verandi uppskoti, har ið Tórshavnar Havn kann hava smærri bátar.
Kostnaðarmeting er gjørd, og mett er, at kostnaðurin at er 614.744,00 uttan mvg.

Býarskipanardeildin ætlar at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið, soleiðis at arbeiðast kann við at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011:** Nevndin samtykti at senda málið í havnarnevndina til ummælis.

**Havnanevndin 11. apríl 2011:** Verður ætlanin framd, samtykti ein meiriluti í havnarnevndini Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen, Jógvan Arge og Levi Mørk, at bátabummar verða lagdir frammanfyri, soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar og at hetta verður gjørt og fíggjað sum ein partur av ætlanini.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur ikki undir við ætlanini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2011:** Bogi Andreasen og Levi Mørk taka undir við tilmælinum til fundin 4. apríl 2011, tó soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar.

Jógvan Arge og Halla Samuelsen vísa á sína støðu í havnarnevndini.

Ein minniluti: Jan Christiansen vísir til sína støðu í havnarnevndini 11. apríl 2011.
Nevndin beinir málið víðari í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011: Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov samtykti at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum til fundin í byggi- og

býarskipanarnevndini 4. apríl 2011. Harafturat mælir fíggjarnevndin býráðnum til at taka undir við meirilutanum í havnanevndini 11. apríl 2011 um at bátabummar verða lagdir frammanfyri, soleiðis at samlaða talið av bátaplássum ikki minkar og at hetta verður gjørt og fíggjað sum ein partur av ætlanini. Arbeiðið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 9 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddi: Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Anfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur skipað fyri undirhondsboð fyri arbeiðstøkuna at fremja arbeiðið á Kongabrúnna, og arbeiðstakarir vóru P/F Nomatek og P/F Mest.
P/F Nomatek bjóðaði 1,266.895 kr., ímeðan P/F Mest bjóðaði 1.939.000 kr. Tilboðini vóru ov høg, og valt var at fara til samráðingar við P/F Nomatek, sum hevði lægra tilboðið, um at fáa sparingar framdar á prosjektið. Endaliga úrslitið varð, at P/F Nomatek kom við tilboði á 841.971 kr. uttan mvg. at fremja prosjektið.

Roknað er ikki við kostnaði fyri óvæntað og eftirlit, men einans mvg og innanhýsis prosjektumsiting.

Hetta er grundað á, at byggideildin sjálv stendur fyri eftirlitinum. Talan er um eina einfalda verkætlan sum bert umfatar grevstur av botni, sum verður framd av Tórshavnar havn, sum er von við slíkt arbeiðið, uppsetan av simplari stálkonstruktion, montering av forboraðum dekksviði.

Tórshavnar Havn stendur fyri arbeiðnum av grevstur og burturbeining av botntilfari í. Kostnaðurin fyri hetta er: 80.000 kr u/mvg.

Í mun til prístalsregulering er talan um stutta verkætlanartíðarskeið í inniverandi árinum, sum ikki kemur at verða umfatað av prístalsregulering.

Tilsamans kostar hetta prosjektið sostatt 979.594 kr. við mvg.

| | |
|---|---|
| Tilboð frá P/F NOMATEK: | 841.971,- kr |
| Tilboð uppá grevstur frá Tórshavnar Havn | 80.000,- kr |
| Innanhýsis prosjektumsiting 2% | 20.000,- kr |

| | |
|---|---|
| Samanlagt | 941.971,- kr |
| Tilsamans við mvg 6,25% | 999.594,- kr |

Tað sum írestar, er veiting av bátabrúgvum, ið kosta 80.000. Mælt verður til at taka bátabrúgvarnar av aðrari konto. Skotið verður upp, at taka pengarnar av konto 6211, sum í ár væntandi hevur avlop at flyta til næsta ár.

Sambært tíðarætlanini verður arbeiði liðugt til jóla 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av tilboðnum við avtalaðum sparingum frá P/F Nomatek, og at góðkenna sáttmálan áljóðandi 841.971 kr u/mvg, og av tilboðinum frá Tórshavnar Havn áljóðandi 80.000 kr u/mvg, og at játtað kr. 1,0 mió til verkætlanina. Somuleiðis at fíggja keypið av bátabrúgvunum av konto 6211 í ár.

**Ískoyti:**
Ein meiriluti í byggi- og býarskipanarnevndini hava tikið undir við tilmælinum. Hetta er sent við telduposti og er journaliserað í málið.

Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Levi Mørk taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið 8. september 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. september 2011:** Nevndarlimir hava tikið støðu til málið um teldupost áðrenn fundin soleiðis:

Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Levi Mørk taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur ikki undir við tilmælinum.

Avgerðin varð staðfest á fundinum, tó soleiðis, at Levi Mørk var ikki við á fundinum.

**Ískoyti:**
**<u>Sí tilboð og tekningar, viðvíkjandi prosjektinum á Kongabrúnni</u>**

Tórshavnar kommuna hevur staðið fyri, at myndugleikaprosjekt, byggilovyi, útbjóðing, sáttmálaskriv o.a. er komið til høldar í hesum prosjekti. Men í og við at hetta er eitt prosjekt framvið bryggjukanti á Kongabrúnni, og at Tórshavnar Havn vildi hava bátapláss framvið sjálvari stál og timbur konstruktiónini, so hevur Tórshavnar Havn ein stóran leiklut í hesum prosjekti. Tórshavnar Havn hevur hevur staðið fyri statiskum útrokningum.

Azobe timbrið er komið til landið t. 30. januar. Týsdagin 31. januar varð timbrið veitt á staðið, og týsdagin seinnapart varð farið í gongd við monteringina av timbrinum. Tað vísir seg at timbrið ikki heldur í styrki til lastina omaná. Timburarbeiðið varð steðgað beinanvegin.

Ástaðarfundur var á Kongabrúnni hósdagin 2. februar , um hvussu arbeiðið so skuldi fara fram. Endaliga uppskotið var 5 sektiónir av 2 IPE 220 bjálkum forankraðir hvør sínu megin í verandi HE180B og 1 IPE220 (avstívaður í miðjuni) verður festur í miðjuni, við øllum sum hartil hoyrir, sí tekningar og tilboð.

Kostnaður fyri hetta er: 169.255,66 kr + 6,25% mvg = uml. kr. 180.000. Umsitingin hjá Tórshavnar Havn og tekniska umsitingin hava umrøtt málið, og semja er um at mæla til, at hesin meirkostnaðurin verður játtaður av Tórshavnar Havn.

Nú arbeiðið er komið væl áleiðis sæst, at betong trýkanturin við gongubreytina við Tryggingarfelag Føroya stendur ógvuliga berur. Betong trýkanturin skuldi upprunaliga timbur áleggjast, men posturin varð tikin úr, vegna sparing á prosjektið. Ynski er um at leggja timbur á hendan partin eisini, so prosjektið fær eina betri heild.

Talan er timburarbeiði við veiting(tilfar og frakt) og íseting(arbeiðsløn) av 2x8"azobe timbri. Klæðast skal á forsíðurnar, av tí at hæddarmunurin er frá 0.5 til 1 metur, har sum tað er mest). Har skulu undirsløg verða við vinklum, festum og boltum. Somuleiðis skal tilfarið gerast og borast

Arbeiðið er mett til uml. kr. 150.000, men av tí at dagbøtur verða álagdar arbeiðstakaran fyri seinkingar fyri uml. kr. 30.000, kann hetta arbeiði gerast fyri eina netto meirjáttan á kr. 120.000,- afturat.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin,býararkitekturin og havnameistarin mæla til:

- at játta kr. 180.000 afturat til eyka stálarbeiði, og at tað verður fíggja av Tórshavnar Havn

- at játta kr. 120.000 afturat til eyka timburarbeiði v.m., og at tað verður fíggjað av reguleringskontoiini.

og at beina málið í býráðið um havnarnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Halla Samuelsen samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Símun Simonsen tekur støðu á seinni fundi.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur ikki støðu í málinum.

**Havnarnevndin 23. apríl 2012:** Samtykt at játta kr. 180.000,- til eyka stálarbeiði, at fíggja av íløgum fyri Tórshavnar havn í 2012. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og at játta at kr. 120.000 afturat til eyka timburarbeiði v.m., og at tað verður fíggjað av reguleringskontoini.

**Býráðið 2. mai 2012:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**114/12** **2011-2166**

**Kampingplássið Yviri við Strond**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Útvegan og uppsetan av nýggjum bygningum til kampingvirksemi og tænastur til ferðafólk.

Verandi kampingpláss varð sett á stovn í 1980-81. Kampingskúrarnir til W.C. og baðirúm. Hetta vórðu byggiskúrar sum byggifelagið Guttesen og Staksberg tá bygdu. Síðani er bygdur ein skúrur aftrat til konufólk og køk, matgerð og matstovu. Húsini ella skúrarnir eru nú millum 30 og 20 ára gamlir, og hóast gott viðlíkahald eru teir ikki tíðarhóskandi og krevja størri og størri umvælingar. Ikki er sørt at vitjandi úr útlondum viðmerkja, at umstøðurnar eru vánaligar.

Tórshavnar kommuna eigur økið matr. nr. 672a, samlað vídd á matrikli 27505 m²
Byggisamtykt D1.

Tekningar eru við fasadum og innrætting hevur býararkitekturin latið gera. Bygningurin er staðsettur á sama øki sum verandi. Tað er tað besta, havandi friðingarmynduleikan í huga. Ætlan er at keypa lidnar pavilliongir. Nýggjur rottangi skal setast upp og bindast í skipaða kloakk í vegnum.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 3,0 mió á kto 6275 Fríðkan av kommununi, harav umsitingin í sambandi við framløguna av fíggjarætlanaruppskotinum mælti til at nýta kr. 1,0 mió til nýggjar bygningar á staðnum. Ein neyvari meting sigur tó, at kostnaðurin fyri nýggjar bygningar og kloakk-/rottangaviðurskifti, væntast at kosta uml. 1,5 mió kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at taka undir við uppskotinum, og at játta kr. 1,5 mió av kto 6275 til nýggjar bygningar og broyting av rottanga v.m. á kampingplássinum Yviri við Strond, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jògvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**115/12** **2011-2343**

**Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur og frítíðartilboð til børn í 3. flokki**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Áheitan komin frá foreldraráðnum fyri frítíðarskúlarnar í Tórshavnar kommunu um at hava opið arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, harumframt heita tey á kommununa um at víðka frítíðarskúlan til eisini at fevna um 3. flokk.

Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at frítíðarskúlin hevur opið dagar, tá skúlin er stongdur og er komin til ta niðurstøðu, at frítíðarskúlin hevur opið 2., 3. og 4. apríl og 10. til og við 13. apríl. Opið er í summar frá 2. juli til og við 20. juli og eina viku í heystfrítíðini. Harumframt skulu frítíðarskúlarnir hava opið 3 dagar afturat, har hin einstaki frítíðarskúlin lagar seg eftir skúlanum, hann er tengdur at. Mælt verður til, at frítíðarskúlarnir leggja saman í summarfrítíðini og aðrar skúlafrídagar, tá til ber at leggja saman, so øll tey, ið hava tørv á frítíðarskúla, fáa tilboð. Nevndu dagar hevur frítíðarskúlin opið frá kl. 08.00 til 17.00. Tað er

uppgávan hjá frítíðarskúlunum at samskipa, hvussu frítíðarskúlarnir hava opið í mun til tørvin. Skipanin verður endurskoðað eftir heystfrítíðina 2012.

Mettur kostnaður at víða upplatingartíðina er kr. 350.000 um árið. Peningurin fer av játtanini hjá dagrøktini, ið leyp av í fjør, orsakað av, at dagrøktin ikki hevði fult tal av børnum í mun til normeringina. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at halda seg til játtanina, ið er sett av til endamálið.

Sum nevnt omanfyri, heita foreldraráðini á Tórshavnar kommunu um at víða frítíðarskúlan til eisini at vevna um 3. flokk. Umsitingin hevur kannað møguleikan og hevur í hesum sambandi havt samband við frítíðarskúlarnar. Ætlanin er at bjóða børnunum í 3. flokki líknandi tilboð, sum vit bjóða í Margarinfabrikkini, t.v.s. eitt frítíðartilboð. Eitt frítíðartilboð hevur nøkulunda tað sama at bjóða sum ein frítíðarskúli, við verkstøðum, ítrótti og møguleika við spæli yvirhøvur. Børnini, ið taka av hesum tilboði ganga frá skúla sjálvi og verða ikki skrásett uppá á sama máta, sum í frítíðarskúlanum. Frítíðarskúlarnir eru ymiskir, t.d. hava vit ein náttúrufrítíðarskúla í Havnardali, við djórum og fríari náttúru. Aðrir frítíðarskúlar hava góða møguleikar fyri ítrótti.

Í løtuni ganga 626 børn í frítíðarskúla, taka vit ein árgang eru tey um 300, tekur helmingurin av børnunum úr 3. flokki av tilboðnum, verða útreiðslurnar frá 15. august kr. 896.250 til 1. januar 2013. Útreiðslurnar til 3. flokk t. v. s. tímar til starvsfólk og rakstur yvirhøvur, eru helmingurin av tí, tær eru til 1. og 2. flokk í frítíðarskúla.

Í flestu førum rúmast børnini í verandi frítíðarskúlum, men neyðugt verður at útvega hølir í ovari parti av býnum. Mettar útreiðslur til leigu fyri 1 ár eru kr. 200.000. Útreiðslur til útgerð og tilfar er kr. 200.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri børn og ung mæla mentamálanevndini at játta kr. 350.000 av konto 3101 hjá Dagrøktini til frítíðarskúlarnar í sambandi við at tey hava opið skúlafrídagar. Eisini verður mælt til at játta kr. 896.250 til rakstur og kr. 400.000 til húsaútreiðslur, útgerð og tilfar til frítíðartilboð fyri børnum í 3. flokki. Peningurin verður játtaður av kontu 3215 sparingar í sambandi við verkfallið.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Rúni Djurhuus taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til kunningar.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Kunnað varð um málið.

**116/12** **1999-1521 EYE**

**Vegamótið við landsvegin á Hvítanesi (Gøta til Hvítanesar)**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur havt fundir við Landsverkfrøðingin um viðurskiftini viðvíkjandi gerð av viadukt og busslumma á vegamótinum frá landsvegnum oman í bygdina.

Landsverkfrøðingurin hevur fingið játtan fyri fígging fyri árið 2001 av arbeiðinum at gera eina viadukt undir landsvegin.

Skal viaduktin gerast, verður neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at gera eina gongubreyt í ovara borði frá íbindingini og niðan móti Vegnum Langa. Landsverkfrøðingurin hevur gjørt uppskot og kostnaðarmeting av arbeiðinum at gera eina viadukt. Umsitingin hevur gjørt uppskot til busslumma.

Um Landsverkfrøðingurin fer undir at gera viadukt, so skal Tórshavnar kommuna gera og rinda fyri gongubreyt í ovara borði, sum verður mett at kosta einar 1,5 mill. kr. Landsverkfrøðingurin hevur boðað frá, at um gongubreyt verður gjørd á niðaru síðu, so eru teir sinnaðir at gjalda fyri gongubreytina og gonguteigin tvørtur um Hvítanesvegin við Vegin Langa. Tó veitir og uppsetir kommunan gøtuljóssteyrar.

Tekniska nevndin helt ástaðarfund mánadagin 3.desember 2001, kl. 13.00. Har var avgjørt, at um hvítanesnevndin varð kunnað, so skuldi arbeiðið setast í gongd at gera gongubreyt í niðara borði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at staðfesta avgerðina frá ástaðarfundinum hjá teknisku nevndini tann 3. desember 2001, soleiðis at gjørd verður gongubreyt á niðaru síðu á landsvegnum, sum Landsverkfrøðingurin rindar fyri, og at kommunan stendur fyri og rindar gøtuljósarbeiðið.

**Tekniska nevnd 14. desember 2001:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

**Ískoyti:**
Umsitigin leggur fram uppskot frá P/F HMP Conslult til støðutakan. Økið til gøtuna verður býtt soleiðis á fylgjandi ognum:

a) Uml. 819 m² av matr. nr. 'f', Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
b) Uml. 384 m² av matr. nr. 135et, Hoyvík (partur av matr. nr. 2, eigari Føroya Jarðarráð).
c) Uml. 452 m² av matr.nr. 'f', Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fyribils kostnaðarmeting frá P/F HMP Consult fer gøtan at kosta uml. 1,2 mió. kr. u/mvg, men við ráðgeving og eftirliti.

Vísandi til býtið av íløgum fyri fíggjarárið 2004 (sí notat j. nr 200400093/3), eru settar 1,0 mió kr. til gøtuna til Hvítanesar og kr. 2.677.300,- til Ytra Ringveg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til,
at taka undir við fyriliggjandi uppskoti frá P/F HMP Conslult.
at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at ognartaka:
a) uml. 819 m² av matr. nr. 'f', Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
b) uml. 384 m² av matr. nr. 135et, Hoyvík (partur av matr. nr. 2, eigari Føroya Jarðarráð).
c) uml. 452 m² av matr. nr. 'f', Hoyvík (almennur vegur, eigari Landsverkfrøðingurin).
at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur, tá ið eigaraviðurskiftini eru fingin í rættlag.

**Tekniska nevnd 4. mai 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2004:** Samtykt at taka upp samráðingar við eigararnar, um at kommunan ognar sær lendið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at umsitingin hevur vent sær til ein av eigarunum - Landsverk, hevur stovnurin boðað frá, at ætlaða gøtan liggur ov nær skráanum til landsvegin.

Umsitingin hevur í hesum sambandi gjørt nýtt uppskot við kostnaðarmeting til gøtusamband millum Hvítanes og Klingruna, sí j. nr. 200500503/3 og 4. Annað uppskotið er har gongugøtan verður knýtt í nýggju rundkoyringina við Vegin Langa og hitt er við eini viadukt stutt norðan fyri nýggju rundkoyringina við vegamótið Vegurin Langi/Hvítanesvegurin.

Støða skal verða tikin til um:
1. kommuan skal halda fast við áður tikna avgerð í teknisku nevnd tann 4. mai 2004, ella um
2. kommunan skal taka undir við nýggja uppskotinum,ella um

3. kommunan skal sleppa ætlanini at gera gøtu til Hvítanesar.

Kostnaðarmetingar verða framlagdar á fundinum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at beina málið í hvítanesnevndina til kunningar.

**Tekniska nevnd 3. mars 2005:** Nevndin samtykti at beina málið í hvítanesnevndina til ummælis.

**Hvítanesnevndin 9. juni 2005:** Nevndin heitir á myndugleikarnar um at skipa fyri, at Hvítanes fær somu gongubreytarloysn sum Norðasta Horn ella Oyggjarvegurin frá Krákugjógv til gamla Dalavegin.

Nevndin vísir staðiliga á, at ein loysn hevur bráðskund, tí í dag ferðast nógv fólk til gongu á landsvegnum, eisini foreldur við barnavognum.

**Hvítanesnevndin 22. september 2005:** Nevndin minnir á málið og biður um, at málið verður loyst.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sett seg í samband við Landsverk við fyrispurningi um møguleika fyri at fyriskipa gongugøtuna á sama hátt, sum gjørt er fram við Velbastaðvegnum sambært áheitan frá staðbundnu nevndini frá 9. juni 2005.

Landsverk eru ikki sinnaðir at loyva hesi loysn vísandi til, at pláss ikki er fyri einum grønum geira millum koyribreyt og gongugøtu. Eisini er stovnurin ikki sinnaður at lata gera gongugøtu fram við koyribreytini, vísandi til at talan er um ein 80km/t veg. Landsverk er haraftur ímóti sinnaður at lata gøtuna liggja í skráanum.

Umsitingin hevur saman við ráðgeva latið gera nýggj uppskot sum taka støði í seinastu viðmerkingunum frá Landsverki. Uppskotini verða framløgd av ráðgeva og umsitingini.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin vísir til tilmælið til fundin í nevndini 4.mai 2004.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum og at beina málið í hvítanesnevndina. (sí mál nr. 1999-1521/9).

**Hvítanesnevndin 1. desember 2005:** Nevndin vísir til skriv frá Landsverki, dagfest 25. oktober 2005, og mælir til, at tikið verður undir við uppskotinum til gerð av gøtu fram við landsvegnum við ásettum treytum, og at farið verður gongd við arbeiðið sum skjótast.

Eisini verður mælt til, at vegstokkur verður fram við allari gøtuni.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at heita á Landsverk um at gera arbeiðið.

Kr. 1.000.000 eru avsettar til arbeiðið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur innheintað kostnaðarmetan frá HMP Consult viðvíkjandi gerð av 2 m breiðari breyt aftan fyri vegstokk og sambært kravi frá LV 1,5 m frá vegastokkinum. Ein fyribils kostnaðarmetan vísir kr. 5.535.259,00.

Kostnaðarmetanin er nærri útgreinað í skjali 1999-1521/31. Viðmerkjast skal, at ognartøka er ikki íroknað.

Mett verður at talan er um eina sera dýra loysn við tað, at neyðugt er at breiðka allan høvuðsvegin, sum í støðum hevur upp til 25 m langan skráa oman eystureftir.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006**: Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Leivur Hansen, samtykti at mæla býráðnum til um fíggjarnevndina, at fara undir samráðingar við Landsverk at yvirtaka Hvítanesvegin frá Eystara Ringvegi til rørportrið á høvdini norðan fyri Hvítanes.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

Fíggjarnevndin 15. mars 2006: Samtykt at taka upp samráðingar við Landsverk.

Hvítanesnevndin 8. juni 2006: Nevndin tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd um at yvirtaka Hvítanesvegin, soleiðis at endalig loysn fæst á málinum um gongubreyt til Hvítanesar.

Nevndin biður um at fáa eina tíðarætlan fyri møguligari yvirtøku.

**Hvítanesnevndin 6. september 2007:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

Nevndin vísir aftur á gøtu í ovara borði við viadukt – vegna ferðslutrygd ella 50 km veg.

**Hvítanesnevndin 31. januar 2008:** Útsett til næsta fund.

**Hvítanesnevndin 4. september 2008:** Málið varð umrøtt. Málið verður parkerað inntil greiða er fingin á nýggja innkomuvegnum til Havnar.

Málið verður sent fíggjarnevndini til kunningar.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Hvítanesnevndin 17. desember 2008:** Samtykt at taka málið upp við Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, um at yvirtaka vegin.

- Umsitingin greiðir frá status í málinum.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til:

1. at taka upp samráðingar við Landsverk um at bøta um ferðslutrygdina við vegamótið á Hvítanesvegnum við Mannbrekku.
2. at taka upp samráðingar við landstýrismannin um yvirtøku av Hvítanesvegnum frá Eystara Ringvegi norður um íbindingina frá Sandvíkarhjalla.

**Býráðið 30. apríl 2009:** Einmælt samtykt.

**Hvítanesnevndin 24. september 2009:** Býarverkfrøðingur kunnaði um málið.

- Formaðurin í teknisku nevnd ynskir at viðgera málið. Umboð frá Landsverki koma at greiða frá støðuni í málinum.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** (Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli).

Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot um gøtu, vísandi til t-bræv frá Landsverk, dagfest 13. januar 2010, j nr 1999-1521/48.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur biðið HMP Consult um uppskot og kostnaðarmetan viðvíkjandi gerð av 2 m breiðari breyt aftan fyri vegstokk í samsvar við teldubræv frá Landsverk, dagfest 13. januar 2010, j nr 1999-1521/48, og við træbrúm fram eftir vegskráanum, har hesin eru brattastur.

Uppskotið frá HMP Consult er lýst við plantekning, skurðum og kostnaðarmeting á kr. 2.583.870,- tá MVG, óvæntað og lendisútvegan ikki er íroknað, sí j. nr. 1999-1521/49.

Umsitingin metir kostnaðin av hesi gøtuni at verða kr. 3.405.166,-, tá MVG, óvæntað, umsiting og lendisútvegan er íroknað, sí j. nr. 1999-1521/50.

Umsitingin skal vísa á, at eftirverandi játtan í mesta lagi røkkur til projektering, og at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini fyri 2010 til gøtu til Hvítanes, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at uppskotið verður latið Landsverk til ummælis, og at tað verður ikki arbeitt meira við verkætlanini fyrr enn nøktandi játtan er útvegað.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Samtykt at lata uppskotið til Landsverk til góðkenningar og síðani aftur í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sent skriv til Landsverk, har biðið verður um at Landsverk góðkennir at gøtan verður gjørd samsvarandi uppskotinum frá HMP Consult, har gøtan verður gjørd við træbrúm fram eftir vegskráanum, har hesin eru brattastur (sí j. nr. 1999-1521/52).

Landsverk hevur í skrivi, dagf. 20. mai 2010, til Tórshavnar kommunu, í høvuðsheitum góðkent at gøtan verður gjørd samsvarandi uppskotinum frá HMP Consult og vil lata brúksrætt til lendið undir gøtuni, men setir ymsar treytir m.a. um at íbinding av gøtuni við endarnar verður lýst betur, um at gøtan verður íbundin niðan fyri bussskýlið við Hvítanes, um at atkoma verður frá gøtuni til gonguteigarnar við rundkoyringina og um girðing fram við landsvegnum og girðing av gøtuni (sí j. nr. 1999-1521/53).

Umsitingin hevur biðið HMP-Consult kostnaðarmeta gøtuna av nýggum, við fyriliti fyri teimum treytum, sum Landsverk setir.

Umsitingin metir nú kostnaðin av hesi gøtuni at verða kr. 3.870.000,-, tá MVG, óvæntað, umsiting er íroknað og tá treytirnar frá Landsverk verða loknar (sí j. nr. 1999-1521/55).

Umsitingin skal aftur vísa á, at eftirverandi játtan í mesta lagi røkkur til projektering, og at ongin játtan er avsett í fíggjarætlanini fyri 2010 til gøtu til Hvítanes, og at játtan má fáast til vega, áðrenn projektering og bygging verða sett í verk.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini vísa til samtykt í Hvítanesnevndini 4. september 2008 og mæla til, at málið verður parkerað, til greiða er fingin á nýggja innkomuvegnum til Havnar, ella í øðrum lagi, at málið verður beint í fíggjarnevndina til raðfestingar á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Tekniska nevnd 23. september 2010:** Málið varð umrøtt.

**Hvítanesnevndin 14. mars 2011:** Býarverkfrøðingurin tekur málið upp við Landsverk. Málið verður lagt fyri ferðslunevndina.

**Ferðslunevndin 12. desember 2011:** Útsett.

**Ferðslunevndin 15. desember 2011:** Til næsta fund er ynskiligt at umboð frá Landsverk verður innkallað.

**Ferðslunevndin 17. januar 2012:** Fríðrík Heinesen var og greiddi frá treytum, sum Landsverk setir í sambandi við gøtuna fram við vegnum til Hvítanesar. Víst varð til skriv, dagfest 20. mai 2011, frá Landsverk.

**Ískoyti:**
Grundað á seinastu afturmeldingarnar frá Landsverki, har víst verður til skriv dagf. 20. mai 2012, (j.nr.1999-1521/53) eru staðfestingarnar frá kostnaðarmetingini frá umsitingini (j. nr. 1999-1521/54 og 1999-1521/55) framvegis galdandi. Sostatt er samlaði fíggjartørvurin fyri nevndu gøtu kr. 3.867.422,-.

Fyri at fáa eftirkanna um tað kunnu finnast aðrar loysnir enn tær, ið Landsverk hevur víst á, var ástaðarfundur hildin 31.01.2012 við m.ø. umboðum frá Landsverki. Endamálið við fundinum var at fáa staðfest um tað ber til at flyta verandi autoverju nærri vegmiðju á landsvegnum, uttan at hetta kemur at nerva tekniskum ásetingum hjá Landsverki.
Sambært upplýsingum frá Landsverki ber hetta til, men flytingin av autoverjuni á einstøkum strekkjum kann bert verða gjørd við at seta upp betonverju og samstundis taka verandi autoverju niður. Sp/f HMP Consult eru bindir um at koma við eini kostnaðarmeting av hesi teknisku loysnini.

**Tekniska nevnd 14. februar 2012:** Nevndin tekur undir við framlagda uppskoti (j. nr. 1999-1521/63) og mælir til at umsitingin fær Landsverk at vátta at stovnurin tekur undir við uppskotinum, at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt at játta kr. 100.000 av íløgum, § 6, konto 8175 - Gøta til Hvítanesar og beina málið um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 23. februar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, havt samskift við Landsverk um loysn, haðani svar er komið, at tikið verður undir við fyriliggjandi uppskoti frá sp/f HMP Consult. Umsitingin greiðir frá uppskotinum.

Tekniska nevnd skal taka støðu til um farast skal undir at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at játta 1,4 mió. kr. av íløgum, § 6, konto 8175 - Gøta til Hvítanesar, at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**117/12** **<u>2012-1091</u>**

**<u>Tórshavnar Stórhøll</u>**

Býráðið arbeiddi í 2004 og 2005 við eini ætlan um at gera fótbóltshøll niðan móti Villingardali. Ætlanin var tó fyribils slept, m.a. tí at fleiri líknandi verkætlanir vóru í umbúna kring landið.

Borgarstjórin ynskir, at býráðið tekur støðu til at gera eina størri høll við fleiri brúksmøguleikum heldur enn bert vanliga fótbóltshøll, og at henda verður bygd á sama stað, sum ætlanin var at byggja fótbóltshøllina.

**Lýsing av málinum**
Høvuðsstaðurin og landið alt manglar stórhøll – eina innandura multiarena – til alskyns tiltøk við nógvum áskoðaraplássum. Tórshavnar kommuna eigur at ganga á odda at útvega Føroyum eina slíka stórhøll.

Stórhøllin skal hava fótbóltsvøll bæði til kappingardystir, landsdystir og venjing. Stórhøllin skal harumframt kunna veita umstøður til aðrar ítróttagreinir, til finalur og til størri altjóða kappingar.

Eisini skal stórhøllin vera karmur um størri heimlig og altjóða tiltøk og events. Hetta er serliga innan vinnulív so sum handilsmessur og -ráðstevnur, innan mentan og undirhald so sum stórar konsertir og framsýningar, til stór samkomumøti v.m. Uppskotið er sostatt ein fjølbroytt og fleksibul stórhøll, sum kann vera við til at menna vinnulívið, mentanarlívið og altjóða samstarv. Stórhøllin er tí meira almentgagnlig og røkkur fleiri áhugabólkum.

Stórhøllin skal vera fyri allar føroyingar. Tí eigur býráðið at kanna ymiskar møguleikar at fáa fígging frá almennum og privatum grunnum í Føroyum og uttanlands.

**Tilmæli**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at samtykkja, at málið verður beint í mentamálanevndina at viðgera innihaldsliga partin, og í fíggjarnevndina at útvega fígging, herundir eisini kanna møguleikan fyri fígging úr almennum og privatum grunnum í Føroyum og uttanlands.

**Býráðið 2. mai 2012:** Mál nr. 118/12 varð viðgjørt saman við máli 117/12. Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**118/12** **2012-1092**

**Innandura fótbóltshøll á Vatnarskarði**

Sjúrður Olsen , Boði Andreasen, Jan Christiansen, Vagnur Johannesen og Annfinn Brekkustein biðja um at fáa málið á skrá.

**Býráðið 2. mai 2012:** Mál nr. 118/12 varð viðgjørt saman við máli 117/12. Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**119/12** **2008-0191**

**Íbindingargjald**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Stjórarnir hava umrøtt "politikkin" viðvíkjandi roknihátttinum fyri íbindingargjøldum og biðja um endurskoðan av hesum fyri betur at kunna javnstilla fólk og virkir.

Umsitingin greiðir frá um málið.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at seta í gildi nýggjan útrokningarhátt fyri íbindingargjald og vatngjald galdandi fyri alla bygging. Verandi kloakkgjald á kr. 10,00 pr. $m^2$ av grundøki fellur burtur. Víst verður til skjal 2008-0191/2.

**Býráðið 31. januar 2008:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Beate L. Samuelsen, Høgni Mikkelsen, Jan Christiansen, og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at skipanin nú hevur virkað í eina tíð, verður málið lagt fyri til umrøðu og møguliga tillaging.

Nýggi útrokningarhátturin fyri íbindingargjøld, sum er galdandi fyri alla bygging í kommununi ásetur eitt gjald eftir nøkrum sokallaðum persónsekvivalentum (PE-eindir), alt eftir hvat slag av virksemi talan er um, og brúkar síðani fermetrarnar av tí sum bygt verður at rokna út eftir.

Dømi um gjøld:

| | |
|---|---|
| - Sethús á 100 m² eitt plan | kr. 23.750 |
| - Sethús á 100 m² við kjallara: | kr. 39.900 |
| - Sethús á 100 m² við kjallara og loft | kr. 49.875 |

Talan er um eitt íbindingargjald, sum skal dekka part av útsreiðslunum fyri kommunalar veitingar fram til økið og fyri tær avleiðingar sum útstykkingin og byggingin annars hevur við sær.

Vísandi til omanfyri nevnda, so kundi ein loysn verið at býtt gjaldið í 2 partar, soleiðis at ein partur verður goldin tá útstykkingarloyvi verður givið og ein partur tá byggiloyvi verður givið.

Møgulig uppskot verða løgd fram á fundinum.

Elin Lindenskov var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger eitt nýtt uppskot at leggja fyri nevndina aftur.

**Nýtt uppskot:**
Vísandi til nevndarviðgerðina hin 22. aug. 2011, har avgjørt varð at endurskoða skipanina fyri íbindingargjøld soleiðis, at kommunan fær endurgoldið ein part longu tá kommunan hevur sínar útreiðslur til veitingar– tvs. tá ein útstykking fer í gongd, hevur umsitingin arbeitt við einum broytingaruppskoti.

Íbindingargjaldið verður tað sama sum nú, men tann broytingin verður gjørd, at helvtin av gjaldinum verður goldið tá útstykkingarloyvið verður útskrivað og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað.

<u>Tá ið byggiloyvi verður givið:</u>
Reguleringsfaktorurin verður settur til 0,5 (hinar 0,5 til útstykkingarloyvið), annars verður skjalið tað sama.
Upplýst verður á rokningini um bygningsslag, PE-faktor, regulering, fermetrar og kostnaður íalt.

Dømi um gjøld eftir nýggja uppskotinum:
- Sethús á 100 m² ein hædd kr. 11.875
- Sethús á 100 m² við kjallara: kr. 19.950
- Sethús á 100 m² við kjallara og loft kr. 24.938

Skiftisreglur fyri gjald í samband við byggiloyvi:
Skeringsdato fyri broytingini verður dagfestingin av góðkenningini av byggiloyvinum. Tó so, at tey sum hava goldið fult gjald eftir verandi skipan, fáa tað aftur sum tey hava goldið ov nógv, soleiðis at teirra gjald verður tað sama sum eftir nýggja uppskotinum.

Tá ið útstykkingarloyvið verður givið:
Reguleringsfaktorurin verður settur til 0,5 (hinar 0,5 til byggiloyvið), annars verður skjalið tað sama.
Til fermetrar, at roknað gjaldið eftir, verður roknað samlaða víddin av $m^2$, sum kunnu byggjast á øllum grundstykkjunum tilsamans, við tí mest loyvda byggistigi, nettonýtslustigi ella rúmmáti, sum ásett er sambært byggisamtyktini fyri tey einstøku økini. Tað sum sambært byggisamtykt ikki verður roknað uppí hæddarvíddina, verður ikki tikið við í útrokningina fyri útstykkingargjaldið (smáhús upp til 35 m² íalt), men uppí byggiloyvisgjaldið.

Upplýst verður á rokningini um bygningsslag, PE-faktor, regulering, fermetrar og kostnaður íalt.

Dømi um gjøld eftir nýggja uppskotinum:
Grundstykki í A1/A3, 500 m² (bygging 100+100+50) kr. 24.938
Grundstykki í A1/A3, 300 m² (bygging 80+80+40) kr. 19.950

Skiftisreglur fyri gjald í sambandi við útstykkingarloyvi:
Skeringsdato fyri broytingini verður dagfestingin av góðkenningini av útstykkingini. Tó so, at tey sum hava fingið útstykkingarloyvi, sum ikki er útgingið, sleppa undan at gjalda eftir nýggju skipanini, men skulu gjalda eftir tí skipan sum var galdandi tá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at broyta skipanina samsvarandi omanfyri standandi ískoyti.

Somuleiðis verður mælt til, at inngjøld fyri íbindingar verða bókaðar á serstakar konti fyri ávikavist kloakk, vatn og vegir, og at hesar framyvir innganga í vanligu rakstrar- og/ella íløgufíggingina av teimum útreiðslum sum kommunan fær í sambandi við at gera vegir og leggja veitingar fram til útstykkingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen mæla til at íbindingargjaldið fyri kloakk og vatn verður 20,00 kr pr. m² av grundstykkja støddini.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Málið útsett.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Tekniski stjóri kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Sjúrður Olsen biður um málið á skrá.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Málið umrøtt.

Sjúrður Olsen biður um málið á skrá.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Íbindingargjaldið hevur verið álagt øllum borgarum í Tórshavnar kommunu, ið hava fingið/fáa byggiloyvi og harvið eru íbundin í vatnleiðingar, kloakkskipanir og vegir.
Henda praksis gongur rímiliga langt aftur í tíð. Kommunan metir, at fyrstu ferð gjald varð álagt, var umleið ár 1898.

Gjaldið hevur verið endurskoðað leypandi. Kommunan kann dokumentera býráðsavgerðir viðv. nevnda gjaldi aftur til 1942. Hin 27. oktober 1942 avger býráðið at hækka vatngjaldið frá kr. 6 til kr. 8. Nær tað ítøkiliga er ásett til kr. 6 er trupult at meta um.

Hin 31. mars 1969 samtykti býráðið at áleggja "Íbindingargjald" í sambandi við útflýggjan av byggiloyvum við gildi frá 1. apríl 1969, og hevur tað verið støðug siðvenja síðani 1969.

Samtykta gjaldið var í 1969 kr. 500,- fyri vatn og kr. 2 fyri fermeturin av húsastøddini, t.v.s. gjaldið er tvinnað saman av ávikavist vatngjaldi og stødd av bygging/lendi.
Í 1998 verður gjaldið aftur endurskoðað í mun til prís og samtykkir býráðið at hækka prísin til kr. 1.500 fyri vatn og kr. 10 fyri fermetrar av grundøki.

Gjaldið var óbroytt, til býráðið 31. januar í 2008 samtykti endurskoðaða gjaldið. Henda broyting viðførdi ein annan leist at rokna nevnda gjald eftir. Mett varð, at nýggi útrokningarhátturin frá 2008 vildi viðvirka til "rættvísari" gjøld og eisini tók hædd fyri nýggjari byggihættum, av eitt nú íbúðarbygningum í fleiri hæddum, eins og nýggi útrokningarhátturin er ætlaður at javnseta borgarar o.fl., soleiðis at

tað ikki verður gjørdur munur á, um talan er um eina kommunala ella eina privata útstykking ella byggiætlan.

Støðuga og vanliga skipanin við at teingja íbindingargjald at byggiloyvum byrjaði so ella so fyri meira enn 100 árum síðani og hevur verið hevur verið brúkt støðugt, í øllum førum sum vit kunnu dokumentera, síðani 1969.

Somuleiðis er talan um øki – s.s. vatn, kloakk og vegir, ið ikki eru fevnd av positivt orðaðari lóggávu, men liggur innan "kommunalu fulltrúina" at definera og skipa.

Sostatt er í mun til "íbindingargjaldið" heimildin í ávikavist rættarsiðvenju, ið er at meta sum sjálvstøðug rættarkelda, og í kommunalu fulltrúini. Løgdeildin vil í hesum føri vísa á dómin U 1988.352H (Dyrehavsbakken) fyri at vísa á parallellin við rættarsiðvenjum sum heimildargrundarlagi í mun til praktiserað gjøld, ið ikki eru positivt orðað í lóggávu.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Íbindingargjøld 2006-2011, sum eru inngoldin á konto fyri vatnleiðingar og kloakkir

| | **6710 Vatn** | **6810 Kloakk** | **Íalt** |
|---|---|---|---|
| 2006 | 324.000 | 724.935 | **1.048.935** |
| 2007 | 138.000 | 896.065 | **1.034.065** |
| 2008 | 46.000 | 316.933 | **362.933** |
| 2009 | 30.000 | 674.550 | **704.550** |
| 2010 | 37.500 | 276.840 | **314.340** |
| 2011 | 80.872 | 728.496 | **809.368** |
| **Íalt** | **656.372** | **3.617.819** | **4.274.191** |

Harumframt eru gjøld fyri aðrar íbindingar inngoldnar á sølukonto hjá kommununi.

**Tilmæli:**
Vísandi til umrøðuna av málinum á fíggjarnevndarfundi hin 7. des. 2011 og 18. jan. 2012, hevur stjórnin tikið samanum og mælir til, at politiska skipanin tekur støðu til fylgjandi broytingar og uppskot:

1. Útrokningarhátturin, har útgangsstøði verður tikið í slag og stødd av bygging, verður broyttur soleiðis, at gjaldið verður útroknað í mun til mest loyvdu bygging á hvørjum matrikli (nettonýtslustig), og eina prísseting av slag og stødd av leiðingum til hvønn matrikul, alt eftir hvat slag av bygging talan verður um.

2. Verður játtað frávik at byggja meira enn mest loyvda nettonýtslustig, verður gjaldið regulerað soleiðis, at goldið verður fyri allar bygdu fermetrarnar.

3. Útrokningarhátturin verður ikki galdandi fyri broytingar ella víðkan av verandi bygningum. Tó so at um broytingar av verandi bygningum viðføra, at nýggjar ella eyka leiðingar skulu leggjast til bygningarnar, rindar eigarin eftir rokning tað sum broytingin av leiðingum kostar.

4. Íbindingargjøld fyri øll sløg av kommunalum útstykkinginum og byggiætlanum verða innroknað í søluprísin av grundøkinum, soleiðis at helvtin av gjaldinum verður goldið, tá ið grundstykkini verða seld, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.

5. Íbindingargjaldið fyri allar privatar útstykkingarætlanir fyri 2 ella fleiri grundstykkir verður goldið soleiðis, at helvtin av gjaldinum verður goldið tá ið útstykkingarloyvið verður útskrivað, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.

6. Íbindingargjaldið fyri allar privatar byggiætlanir av húsum við fleiri bústaðar- ella nýtslueindum, so sum íbúðarblokkar, skrivstovubygningar, vinnubygningar o.l. verður goldið soleiðis, at helvtin av gjaldinum verður goldið, tá ið útstykkingarloyvið verður útskrivað, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning.

7. Serlig mál, har ávísar byggingar viðføra serliga stórar útreiðslur fyri kommununa, verða viðgjørd einsæris, og kann kommunan í slíkum førum krevja gjald eftir rokning í mun til útreiðsluna.

8. Hesar broytingar fáa gildi frá tí tær eru samtyktar í býráðnum. Tó so at íbindingargjøld, sum eru roknað eftir higartil nýtta útrokningarháttinum frá 1. mai í 2011, verða roknað av nýggjum eftir nýggja útrokningarháttinum, og ov nógv goldið gjald verður afturrindað eigarunum.

At enda verður mælt til, at umsitingin ger uppskot til prísseting av slag og stødd av leiðingum til hvønn matrikul, alt eftir hvat slag av bygging talan verður um, soleiðis sum ásett í pkt. 1.

**Fíggjarnevndin 26. januar 2012:** Umsitingin ger útrokningar og uppskot um gjøld við støði í omanfyristandandi tilmæli, ið verður at leggja fyri næsta fíggjarnevndarfund.

**Býráðið 26. januar 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Til kunningar skal upplýsast at løgdeilin hevur sent svarskriv til Kærustovnin í sambandi við kæru um íbindingargjøld. Annars verður tilfar sent út áðrenn fundin.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2012:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til fylgjandi reglur fyri íbindingargjøld

1. Útrokningarhátturin verður soleiðis, at gjaldið verður útroknað í mun til mest loyvdu bygging á hvørjum matrikli (nettonýtslustig), og PE-eindir/fermetur, sambært skjal 2008-0191/16.

2. Gjaldið fyri hvørja PE-eind, verður ásett til kr. 1.500, og verður hetta tal nýtt saman við nettonýtslustiginum í fyriliggjandi uppskoti til broyting av nettonýtslustigum í almennu byggisamtyktini.

3. Verður játtað frávik at byggja meira enn mest loyvda nettonýtslustig, verður gjaldið reguleráð soleiðis, at goldið verður fyri allar bygdu fermetrarnar.

4. Útrokningarhátturin verður ikki galdandi fyri broytingar ella víðkan av verandi bygningum. Tó so at um broytingar av verandi bygningum viðføra, at nýggjar ella eyka leiðingar skulu leggjast til bygningarnar, rindar eigarin eftir rokning tað sum broytingin av leiðingum kostar.

5. Íbindingargjøld fyri øll sløg av kommunalum útstykkinginum og byggiætlanum verða innroknað í søluprísin av grundøkinum.

6. Íbindingargjaldið fyri allar privatar útstykkingarætlanir verður goldið tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.

7. Íbindingargjaldið fyri allar privatar byggiætlanir av húsum við fleiri bústaðar- ella nýtslueindum, so sum íbúðarblokkar, skrivstovubygningar, vinnubygningar o.l. verður goldið soleiðis, at helvtin av gjaldinum verður goldið, tá ið útstykkingarloyvið verður útskrivað, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning.

8. Serlig mál, har ávísar byggingar viðføra serliga stórar útreiðslur fyri kommununa, verða viðgjørd einsæris, og kann kommunan í slíkum førum krevja gjald eftir rokning í mun til útreiðsluna.

Hesar broytingar fáa gildi frá tí tær eru samtyktar í býráðnum. Tó so at íbindingargjøld, sum eru roknað eftir higartil nýtta útrokningarháttinum frá 1. mai í 2011, verða roknað av nýggjum eftir nýggja útrokningarháttinum, og ov nógv goldið gjald verður afturrindað eigarunum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Jan Christiansen, um at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini við teirri broyting, at gjaldið fyri hvørja PE-eind í grein 2 verður broytt til 750, ið varð einmælt samtykt.

**120/12** **<u>2008-3146</u>**

**<u>Anna Malena Christiansen og Anna Mortensen: Umsókn um at fáa broytt innkoyringina til matr. nr. 1298a, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Anna Malena Christiansen og dótturin Anna Mortensen søkja 30. mai 2008 um aftur at fáa vegatkomuna til matr. nr. 1298a, at verða frá Hoyvíksvegnum, soleiðis sum atkoman var undan frábýti til dótturina í 1982, tá atkoman varð umløgd at vera frá Mýrisnípuvegnum.

Tey siga seg hava ampa av ferðsluni, eftir verandi vegatkomu frá Mýrisnípuvegnum og at hesin ampi gerst ótolandi, tá matr. nr. 1298a fer á fremmandar hendur.

Tey ynskja tískil at verandi vegøkið verður lagt afturat matr. nr. 1298b og at vegaatkoman til 1298a verður broytt til aftur at verða frá Hoyvíksvegnum.

Umsøkjararnir føra eisini fram, at umstøðurnar eru nógv broyttar síðani 1982, við tað at Tjarnargarður, Adventistaskúlin,Vøggustova og mong onnur hava beinleiðis vega atkomu til Hoyvíkvegin.

Eftir tilmæli frá umsitingini, boðar býarverkfrøðinurin, í skrivi dagf. 8 september 2008, umsøkjarunum frá, at kommunan ikki kann ganga áheitanini á møti, grundað á at Hoyvíksvegur er týðandi høvuðsvegur á teininum, har søkt verður um loyvi til útkoyring, og at ein privat útkoyring á nevnda stað verður til ampa fyri trygdina og ferðsluna á Hoyvíksvegnum.

Í skrivi, dagf. 8. september 2008, og í skrivi, dagf. 14. oktober 2009, biðja umsøkjararnir um at málið verður tikið upp í teknisku nevnd.

Um undirtøka fæst frá umsøkjarunum, mælir umsitingin til, at verandi atkomuvegur frá Mýrisnípuvegi til matr. nr. 1298a og 1298b, Tórshavn, við marknaumskipan verður fluttur burtur frá setúsunum, sum standa á matr. nr. 1298b, Tórshavn.

Umsitingin mælir til, at Tórshavnar kommuna, sum ánari av grannastykkinum matr. 727d, Tórshavn, viðvirkar til eina marknaumskipan millum matr. nr.

1298a, 1298b, og 727d, Tórshavn, sum lýst á skitsum, sum umsitingin hevur gjørt (sí j. nr. 2008-3146/5).

Marknaumskipanin kann verða gjørd við at Tórshavnar kommuna letur uml. 45 fermetrar burtur av matr. nr. 727d, ímóti at matr. nr. 1298a og 1298c lata ávikavist uml. 30 fermetrar og 15 fermetrar til matr. nr. 727d.

Síðani kann marknaumskipan verða gjørd ímillum matr. nr. 1298b og matr. nr. 1298c, soleiðis at vegaatkoman í 4,2 m breidd, til matr. nr. 1298a verður flutt burtur frá setúsunum, sum standa á matr. nr. 1298b, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini, mæla til, at nevndin samtykkir at atkoman til matr. nr. 1298a, Tórshavn, framhaldandi skal vera frá frá Mýrisnípuvegnum, og at nevndin heitir á umsitingina av komunalum ognum, at fara undir samráðingar við umsøkjarnar, um marknaumskipan millum matr. nr. 1298a og 1298b, Tórshavn, samsvarandi tilmælinum frá umsitingini.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umboð fyri eigaran, Ragnar C. Joensen og Anna Mortensen hava á fundi við umsitingina 13.04.2011 umrøtt umbønina um atkomu til matr. nr 1298a frá Hoyvíksvegnum. Á fundinum var uppskotið um marknaumskipan framlagt, men tey søgdu seg ikki hava fingið hesa fráboðan áður. Tey hava síðani boðað frá, at tey framhaldandi ynskja at fáa vegatkomu til matr. nr 1298a frá Hoyvíksvegnum.

**Tilmæli:**
Vísandi til at samtykt í teknisku nevnd frá 3. desember 2009 um uppskot til loysn um marknaumskipan ikki er komið á mál, mæla býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildinini frá at ganga umbønini á møti um at fáa vegatkomuna til matr. nr. 1298a at verða frá Hoyvíksvegnum.

Víst verður harumframt til býráðssamtykt frá 5. november 1981 um at loyva sundurbýti av matr. nr. 1298 við teirri treyt, at innkoyringin til sundurbýttu matriklarnar skal verða frá Mýrisnípuvegnum.

**Tekniska nevnd 28. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umboð fyri eigaran hava vent sær til umsitingina við umbøn um at fáa høvi at koma á tal við nevndina.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti, at umsitingina letur gera aðra smidliga atkomuloysn frá Mýrisnípuvegnum, fyri matr. nr. 1298a og 1298b, yvir matr. nr. 727d, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Fyrisiting kommununar hevur, eftir fund við umsøkjarnar, latið teimum tvey uppskot um atkomu frá Myrisnípuvegnum, við tilhoyrandi uppskoti til marknaumskipan millum matriklarnar, matr. nr. 1298a, 1298b, 1298c, 727d og litra er.
Uppskotini eru nevnd ávikavist Uppskot A og Uppskot B (sí ávikavist j.nr. 2008-3146/20 og j.nr. 2008-3146/21).

Umsøkjararnir hava í skrivi, dagf. 14. mars 2012 (sí j.nr. 2008-3146/22), boðað frá, at teir taka undir við, at marknaumskipanin millum matriklarnar verður sum eftir uppskoti B, men hava viðlagt skitsu, sum vísir at umsøkjararnir, í stóran mun við umskipan, ætla at nýta nýggju vegatkomuna til parkering.

Støðutakan til omanfyri standandi loysn skal staðfestast í byggi og býarskipanarnevndini og í fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini, mæla til, at nevndin samtykkir, at marknaumskipanin kann gerast samsvarandi uppskoti B, um vegatkoman ikki verður nýtt til parkering, at parkering verður víst til at vera inni á egnum matriklum og at málið verður beint í fíggjarnevndina um byggi- og býarskipanarnevndina, um umsøkjararnir ganga undir treytirnar, nevndin setur um parkering.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**121/12** **<u>2012-0865</u>**

**<u>Rakstrarjáttan til Boðanesheimið</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Nærverkið hevur í skrivi dagf. 27. mars 2012 boðað kommununi frá rakstrarjáttanini til Boðanesheimið fyri árið 2012. Sambært játtanini í fíggjarløgtingslógini eru avsettar 7.867.000 kr. til Boðanesheimið til virksemi at lata upp 1. oktober 2012 við 64 búfólkum.

Kommunan fær endurrindað rakstrarútreiðslurnar hjá einstøku røktarheimunum, eisini Boðanesheiminum. Nettojáttanin á fíggjarætlanini hjá kommununi er tí kr. 0 (null). Hóast hetta, verður sambært Fíggjarmálaráðnum mett rættast, at nettojáttanin kr. 0 formliga verður játtað sum eykajáttan.

Boðanesheimið framgongur ikki av fíggjarætlanini fyri 2012. Stovnast skal tí eitt rakstrarstað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta Boðanesheiminum kr. 0 sum eykajáttan, og at stovnað verður rakstrarstað til Boðanesheimið soleiðis:

| 2709 Boðanesheimið | |
|---|---|
| Útreiðslur at leggja út | 7.867.000 kr. |
| Endurgjald í alt | 7.867.000 kr. |
| Nettojáttan | 0 kr. |

**Sosiala nevnd 17. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt

**122/12** **2009-1489**

**Boðanesheimið - alternativ orkuskipan**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært byggiskránni fyri Boðanesheimið er dentur lagdur á at byggja ein sokallaðan lág-orku bygning smbr. orkuklassa 2 í BR-08, svarandi til eina árliga brutto orkunýtslu á 70 kWh fyri hvønn fermetur. Hettar merkir, at herd krøv eru til bæði tættleika og bjálving, umframt at "orkuramman" fyri bygningin skal prógvast í høvuðsprojektinum eftir nærri ásettum reglum.

Afturat hesum leggur byggiskráin upp til alternativa orkuútvinning smbr. pkt. 6.4.4:

"Grøn orkuveiting:
Umframt tilboði við oljufýrdum hitaverki, skal alternativt tilboð gevast við jarðhitapumpu at nøkta samlaða orkutørvin til upphiting og ventilering av bygningi, og upphiting av brúksvatni. Staðseting og tal av holum skal gerast í samráð við Jarðfeingið.

Uppskotið til grøna orkuveiting verður lýst við frágreiðing, principtekning og útrokning av COP-virði, árligari orkusparing og afturgjaldstíð av meirkostnaði."

Í vinnandi tilboðnum frá ArtiCon var alternativt roknað við at borað 25 hol niður á 200 m í økinum kring bygningin og knýta hesi í 4 hitapumpur. Fjarstøðan millum hesi hol er 40 m, svarandi til ein økistørv á uml. 30.000 fermetrar. Meiríløgan er um 1,7 mió.kr., árliga orkusparingin 16 kWh fyri fermeturin og afturgjaldstíðin um 15 ár við grundarlagi í verandi kostnaðarstøði.
Bygningurin er annars sera væl bjálvaður og í høvuðsheitum upphitaður við gólvhita í eini lágtemperatur-skipan (~55o), og sostatt sera væl egnaður til eina hitapumpuloysn.

Undir sáttmálasamráðingunum við ArtiCon í nov-des 2010 gjørdist greitt, at neyðugt var at leingja byggitíðina 2 til 3 mánaðir um jarðhitaskipan var vald, orsakað av nógvu holunum, ið skuldu borast í økinum kring bygningin. Kravið um tíðarleingjan, saman við óvissum um m.a. trygd fyri hita-veitingini, tá ongar royndir eru við jarðhita-skipan av slíkari støddi í Føroyum, førdi til, at avgerð varð tikin um at bíða við alternativari orku fyribils.

Síðan byggingin byrjaði hevur bygginevnd og umsiting, saman við arbeiðstakaranum kannað møguleikan fyri burðadyggari loysn í sambandi við eina hitapumpu-skipan, ið ikki nervar verandi bygging. Komið er fram til, at møguleikar eru eystanfyri vegin Yviri við Strond. Vansin er tó, at økið millum sjóvarmálan og vegin er fríøki/friðað øki, ið krevur serstakt loyvið við serstøkum atlitum í samband við inntriv í lendi. Eisini er økið beint yvirav Boðanesheiminum privat ogn, og verður tískil neyðugt at nýta økið sunnanfyri, sum í løtuni verður nýtt til tjaldingarpláss.

Í sambandi við at farið verður yvir um vegin, hevur ein nýggjur møguleiki stungið seg upp, nevniliga at nýta sjóvarhita heldur enn jarðhita. Møguleikin er einastandandi, tí staðsetingin av bygninginum er so lágt og tætt at sjóvarmálanum. Fyrimunirnir við sjóvarhita fram um jarðhita eru, at økistørvurin er sera lítil, bert eitt lítið pumpuhús niðri við sjóvarmálan, og at tað slepst undan at órógva annað øki. Vansin er, at bert ein roynd higartil er gjørd í Føroyum við sjóvarhita, og ongar langtíðarroyndir eru. Tó skal viðmerkjast, at henda eina royndin, eftir ávísar tillagingar, vísur seg at verða sera væleydnað, og teknikkurin aftanfyri skipanina er sera líkur vanliga jarðhita-skipanini og sostatt ikki ókendur.

Bygginevndin hevur tikið avgerð um, at bygningurin ið best møguligan mun verður fyrireikaður til hitapumpuskipan, jarð- ella sjóvarhita, soleiðis, at leiðingar verða lagdar úr fýrrúmi oman til vegin, og pláss er tøkt í kjallara til hitapumpur,

vatngoymslutangar o.a., sum krevst í hesum sambandi. Hesar fyrireikingar kosta undir kr. 20.000 at fremja nú og viðføra, at tað seinni slepst undan av grava økið upp inn undir bygningin og gera størri broytingar inni fyri munandi størri kostnað.

Hinvegin metir bygginevndin ikki tað verða hennara avgerð at taka støðu til, um stig skal takast til fult og heilt at fara frá ætlaða oljufýrda hitaverkinum og yvir til eina hitapumpuskipan nú, og saknar einfalt eina politiska støðutakan til spurningin um "grøna orku" sum heild at styðjað seg til.

Verður avgerð tikin um at nýta hitapumpuskipan nú, so kunnu ketlar, oljutangi og skorsteinur fyri uml. kr. 2-300.000,- sparast burtur, tó verður neyðugt við einari eykajáttan á fyribils uml. 1,7 mió.kr. fyri sjálva hitapumpuskipanina, íroknað boran av holum ella pumpuhús.

**Sosiala nevnd 3. mai 2011:** Sosiala nevnd samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina, at taka avgerð um burturav at nýta sjóvarhita sum orkuskipan til heimið og at fáa neyðuga fígging til vega.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og avgreiða spurningin um fígging, tá ið kanningararbeiðið er avgreitt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt og at fíggja meirkostnaðin innanfyri verandi karmar

**Nýtt:**
Forkanningarnar eru nú komnar undir land, og vísur tað seg, at samlaði kostnaðurin verður kr. 4,8 mió. kr., sum er 3,1 mió. kr. meir enn upprunaliga kostnaðarmetingin á 1,7 mió. kr.

Orsøkirnar til meirkostnaðin eru als ikki nøktandi lagdar fram fyri umsitingini, men millum annað er talan um eitt væl størri anlegg, ið framleiðir 240 KW ímóti 125-160 KW, sum upprunaliga upplýst.

Ivasamt er um meiríløgan nakrantíð verður vunnin inn aftur. Tó valdast sjálvandi hvussu oljuprísurin verður í framtíðini.

Sum støðan er nú, so eru tvinnir kostir í at velja:

1: Venda aftur til oljufýrdar ketlar, sum í upprunaliga projektinum. Hetta viðførur smbr. útgreiningum hjá ArtiCon ein meirkostnað á kr. 695.000 fyri forkanningar av grønari orku, umframt ávísa umprojektering. Nevnast skal tó, at møguleiki er seinni at venda aftur til t.d. sjóvarhita.

2: Halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og fáa neyðuga fígging til vega. Verandi íløgujáttan til Boðanesheimið ber ikki eina tílíka meirútreiðslu.

**Sosiala nevnd 6. desember 2011:** Nevndin átalar, at so stórur munur er á uppruna kostnaðarmetingini, sum støða er tikin út frá, og endaliga tilboðnum.

Ein meirluti, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen, vísir til, at tilboðið frá ArtiCon er 3,1 mió. kr. dýrari, og mælt verður tí til at venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum, men at møguligt skal verða at venda aftur til sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Halla Samuelsen, mæla til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í sosialu nevnd og venda aftur til uppruna projektið við oljufýrdum ketlum og at møguligt verður at binda í eina skipan við sjóvarhita seinni.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, mælir til at halda fast við tilmæli frá 3. mai 2011 um at nýta sjóvarhita burturav og kanna tilboðið nærri, herundir kost-nyttukanning vísandi til týdningin av, at allir kommunalir bygningar verða upphitaðir við varandi orku.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmæli frá borgarstjóranum, um at arbeiða víðari við sjóhitaskipan og beina málið í fíggjarnevndina at finna fígging.

**Ískoyti:**
Articon hevur í skrivi dagfest 14. desember 2011 boðað kommununi frá, at kostnaðurin fyri lidna anleggið verður kr. 4.800.000 u/mvg, men íroknað allar veitingar og tær óvissur, sum Articon hevur víst á í frágreiðing og tilboði.

Býráðið samtykti 26. mai 2011, at meirkostnaðurin, sum tá varð mettur til kr. 1,7 mió, skuldi fíggjast av verandi íløgukarmi til verkætlaninia. Fíggjartørvurin, sum verður at leggja aftrat samlaðu íløgujáttanini til verkætlanina, er tí kr. 3,1 mió umframt mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at fíggja meiríløguna soleiðis:

Fylgjandi íløgujáttanir (frá 2011 og eldri) verða lækkaðar við nevndu upphæddum.

| Deild | Økið | Løgunr | Heiti | Kr. tús. |
|---|---|---|---|---|
| 2775 | Eldrarøkt | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 750 |
| 4175 | Dagføring av skúlum | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | L62007 | Bygningur til lendisdeildina | 500 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6575 | Kirkjugarðar | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| 7175 | Renovasjón | L71001 | Tyrvingarplássið á Glyvursnesi | 500 |
| 7476 | Smábátahavnir | L00001 | Løgukarmur fyri árið | 500 |
| | **Tilsamans** | | | **3.250** |

Upphæddin á 3.250.0000 kr verður flutt til deild 2775 Eldrarøkt (íløgur) L27002 Boðanesheimið.

**Fíggjarnevndin 10. januar 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon á 4,8 mió kr., ið verður at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti og at heimila umsitingini at gera ískoytissátmála við Articon um arbeiðið.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bogi Andreasen, taka ikki undir við tilmælinum vísandi til, at sjóvarhitaorkan ikki er lønandi fyri kommununa, og at kommunan onga trygd hevur fyri íløguni á 4,8 mió. kr.

**Ískoyti:**
Vísandi til málsetningar býráðsins at arbeiða fyri burðardyggum og umhvørvisvinarligum loysnum, hevur býráðið 14. desember 2011 tikið avgerð um at arbeiða víðari við sjóvarhitaskipan til Boðanesheimið. Talan er um eina nýggja slóðbrótandi loysn, ið ætlandi skal gerast ein varði innan grønar orkuloysnir, og tí mælir samgongan býráðnum til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og taka av tilboðnum hjá Articon á 4,8 mió kr., ið verður at fíggja samsvarandi omanfyri standandi yvirliti og at heimila umsitingini at gera ískoytissáttmála við Articon um arbeiðið.

**Býráðið 10. januar 2012:** Fyrst varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá Heðini Mortensen, Jógvani Arge og Elini Lindenskov í fíggjarnevndini 10. januar 2012, ið var samtykt við 8 atkvøðum fyri og 0 ímøti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Bogi Andreasen.

**Býráðið 26. januar 2012:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddu ikki atkvøðu: Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við sjóvarhitan, ið skal hita Boðanesheimið, verður neyðugt at gera eitt pumpuhús so tætt at sjóvarmálanum sum gjørligt.

Seinnu gjørdar kanningar vísa, at besta stað at leggja eitt tílíka pumpuhús ið er væl vart móti aldu, er inni á matr. nr. 1306a sum skjal 2011-0877/28 vísur. Talan er um privat øki ið eftirkomarar hjá Júst Sivertsen eiga.

Skilabesta loysnin er, at TK keypir uml. 150 fermetrar burturav matr. nr. 1306a, at byggja ætlað pumpuhúsið á, og leggja hettar saman við matr. 672a ið Tórshavnar Kommuna er ánari av. Hettar tryggjar ótarnaða atgongd til eftirlit og viðlíkahald av pumpustøðini.
Kostnaðurin fyri økið er uml. 13.500,- við grundarlagið í prísum frá Búnaðarstovuni, nevniliga kr. 89,- fyri fermeturin.

**Tilmæli:**
Bygginevndin fyri Boðanesheimið biður um heimild til, at taka upp samráðingar og at gera avtalu við ánararnar av matr. nr. 1306a um keyp av uml. 150 fermetrar at leggja saman við matr. nr. 672a, í øðrum lagi at gera ein leigusáttmála um umrødda økið, og at gera avtalu um at leggja leiðingar frá pumpuhúsinum gjøgnum matr. nr. 1306a. Kostnaðurin verður fíggjaður av ókendum innan fyri játtanina til verkætlanina.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir staðiliga frá at nýta ætlaðu orkuskipanina við sjóvarhita.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2012:** Kunnað varð um, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:**

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Kunnað varð um, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Útsett.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**123/12 2012-0456/14**

**Graslíki á Tórsvøll**

Heildarætlanin at gera Tórsvøll til altjóða stadion verður framd í samstarvi við Fótbóltssamband Føroya, og komið er til næsta stigið, sum er at leggja graslíki á vøllin.

Sambært kostnaðarmeting hjá LBF frá 12. mars 2012 er kostnaðurin mettur til kr. 7.453.438 við mvg. Kostnaðarmetingin fevnir um:

Byggipláss
Grevstur og burturkoyring
Gravir, leiðingar og tyrving, íroknað hitarør, sprinklaraannlegg
og drenleiðingar
Uppfylling – planering
Kantseinar og fundamentir
El-arbeiðið
Teknikhús
Graslíki við sand- og gummifyllu (grønum TP-gummi), íroknað
útlagt stoytdoyvingarundirlag, áleið 8400 m²
Fótbóltsmál, 4 stk.full stødd og 4 stk. mini-mál
Prístalsregulering
Ókent umleið
Projektering og eftirlit
Kommunalt MVG 6,25 %

FSF hevur boðað frá, at teir játta 4,5 mió. kr. til at leggja gralsíki á Tórsvøll. FSF og Tórshavnar kommuna verða í felag byggiharrar.

Tórshavnar kommuna tekur grasið/vakstrarlagið av vøllinum og ger alt planeringsarbeiðið, sum endar við, at tað er klárt hjá graslíkisframleiðaranum at leggja graslíki á. Viðvíkjandi graslíki er at viðmerkja, at FIFA skal standa fyri útbjóðingini av hesum partinum.

Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya fara at gera eina samstarvsavtalu um brúk av vøllinum, sum skal verða klár til góðkenningar áðrenn páskir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at arbeiðið at leggja graslíki á Tórsvøll verður framt sambært ætlanini 12. mars 2012 frá LBF.

Eisini verður mælt til at játta kr. 3.100.000 av íløgum 2012 konto 5775 til graslíki á Tórsvøll.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 15. mars 2012:** Nevndin hevur ikki viðmerkingar til prosjektið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. kr. 3.100.000 av íløgum 2012 konto 5775 til graslíki á Tórsvøll.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt.

**Uppískoyti:**
Útbjóðing av jørðarbeiði bleiv boðið út sum undirhonsboð til J&K Petersen og Articon.

Articon hevði lægra tilboðið kr. 3.797.287,00, meðan tilboðið frá J&K Petersen var kr. 4.418.093,00.

Eftir fund 18. apríl 2012 við umboð fyri UEFA og FSF varð kraft, at trygdarfjarðstøðan fram við eystursíðuni skuldi økjast úr 3 m upp í 3,5 m, soleiðis, at trygdargeirin kring allan vøllin verður 3,5 m.

Innkomið boð, og øktur trygdargeiri ger, at kostnaðurin nú er kr. 8.401.492,00.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Articon kr. 3.797.287,00 og at játta kr. 900.000,00 afturat av íløgum 2012 konto 5775.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og taka av tilboðnum Articon kr. 3.797.287,00 og játta kr. 900.000,00 afturat av íløgum 2012 konto 5775.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**124/12** **2012-1064**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesi nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**125/12** **2012-0605 GS**

**Umsókn frá SEV um lendi og byggiloyvi til nýggja transformarastøð millum Gilja Hoyvík. Matr. nr 140a.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
SEV søkir Tórshavnar kommunu um at útvega teimum lendi, og byggiloyvi til nýggja transformarastøð burtur av matr. nr. 140a á fríøkinum við barnagarðin, millum Gilja. Tann nýggja transformarastøðin er ætlanin at betra um spenninggóskuna Millum Gilja og veita streym til nýggju útstykkingina í Djúpagili.

SEV søkir samstundis um byggiloyvi til nýggja transformarastøð, sambært innsendu tekning. Sí j.nr. 2011-0151/3. Skal vekk

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í A3 í 3 grundumráði.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Kommunan hevur skyldu at ávísa SEV øki til transformarastøðir. Grein 10 í viðtøkunum fyri Elfelagið SEV er soljóðandi: "Hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa tað vídd, íð tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar".

Kommunan og SEV hava avtalað hvussu traformarahúsini hjá SEV skulu síggja út, hetta er víst á tekningum sum SEV hevur latið kommununi.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Kommunan skal ávísa SEV øki til transformatorstøð.

**Skjøl til fundin:**

| | |
|---|---|
| Umsøkn | 2012-0605/1 |
| Yvirlitskort | 2012-0605/1 |
| støðumynd | 2012-0605/1 |
| Síðumynd | 2012-0605/1 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og góðtenna staðsetingina av nýggju transformarahúsinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**126/12** **2012-0824/1**

**Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 13. november 2012.**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadalur og Norðradalur og Koltur til býráðsvalið 11. november 2008, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðið 29. mars 2012:** Vald vórðu Bjørgfríð Ludvig, Christian Christiansen, Birgith Dahl Bærentsen og Guðrið Rubeksen.

**-** Av tí at Guðrið Rubeksen er flutt úr kommununi, skal nýggjur limur veljast fyri hana.

**Býráðið 2. mai 2012:** Vald Barbara Vang og Rókur Tummassarson.

**127/12** **2010-1336**

**Skúladepilin við Marknagil – makaskifti**

**Lýsing av málinum:**
Í sambandi við byggingina av skúladeplinum í Marknagili hevur Landsverk ov lítið av lendi tøkt til at lúka ásetingar í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil um byggi- og nettonýtslustig. Til tess at lúka hesar treytir, kann kommunan geva Landsverki loyvi til at nýta part av øki kommununar sum grundarlag undir útrokningini av byggi- og nettonýtslustiginum, sbr. serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil § 5, stk. 1. Talan er í høvuðsheitinum um D1 øki.

Kommunan og búnaðarstovan hava umrøtt møguleikan fyri, at kommunan afturfyri henda rætt yvirtekur øki í Sandágerði og traðir/urtagarðsstykki á Ternuryggi fram við Hoydalsá. Talan er um hesi øki:

**Tórshavnar Kommuna letur:**

| | | |
|---|---|---|
| Matr. nr. 1177, til víddar | | 16.175 m² |
| Matr. nr. 1174, til víddar | | 10.827 m² |
| Part av matr.nr. 1101 og 1100, uml. | | 4.090 m² |
| Íalt uml. | 31.192 m² | |

**Búnaðarstovan letur:**

| | |
|---|---|
| Matr.nr. 979a, (Sandágerð) | 12.371 m² |
| Matr.nr. 985, (Sandágerð) | 75 m² |
| Matr.nr. 979c, (Sandágerð) | 2.872 m² |

Harumframt letur Búnaðarstovan flestallar traðir og urtagarðsstykki á Ternuryggi fram við Hoydalsá, eftir nærri avtalu og góðkenning frá avvarðandi myndugleika.

Búnaðarstovan kemur tá at lata størri lendi enn kommunan, men økið, ið Búnaðarstovan letur, er meira avmarkað nýtsluliga og kemur at krevja umsiting og eftirlit frá kommununnar síðu, m.a. av leigumálum, men samstundis fær kommunan ræðisrættin á økinum.

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at taka prinsippavgerð um, at Landsverk kann nýta part av øki kommununnar, matr. nr. 1177, 1174, 1101 og 1100, Tórshavn, sum grundarlag undir útrokningni av byggi- og nettonýtslustiginum ísv. Byggingina av skúladepli við Marknagil.

Samstundis verður mælt til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um endaligar treytir fyri yvirtøku av lendi frá Búnaðarstovuni í Sandágerði og traðir og urtagarðsstykki á Ternuryggi framvið Hoydalsá eftir omanfyristandandi leisti.

Tóri í Hoyvík var við til hetta máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

Samráðingar hava verið við Búnaðarstovuna um makaskifti. Fyri teir umleið 31.192 fermetrarnar kommunan letur til Skúladepulin við Marknagil letur Búnaðarstovan niðanfyristandandi matriklar tætt við Hoydalsá í Hoyvík:

| Matrikul | Fermetrar |
|---|---|
| 58A | 13.601 |
| 61 | 3.699 |
| 62 | 2.402 |
| 63 | 3.088 |
| 64 | 3.973 |
| 1dn | 2.901 |
| 65 | 2.189 |
| Tilsamans | 31.853 |

**Tilmæli**

Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at makaskifta sambært omanfyristandandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 9. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og makaskifta sambært omanfyristandandi.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**FUNDUR LOKIN KL. 22:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Rúni Djurhuus | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |